# gjandi vinna kring landið



- Hesin hevur verið útróðrarmaður burtur av og er framvegis rættiliga virkin. Hann vísti á trupuleikan við aðrari inntøku, tá hendan bert skal verða 50.000 krónur. Flestu fólk hava sínar føstu útreiðslur og skulu gjalda rentur og avdráttir av sethúsaognum. Haraftrat hevur útróðrarmaður útreiðslur av báti at dragast við.

Løgtingsmaðurin sigur, at tað eisini eru tíðarskeið av árinum, har tað ikki loysir seg at rógva út, og tá hevði tað komið væl við hjá útróðrarmonnum at kunnað arbeitt nakrar tímar uppi á landi, um tørvur er á eykafólki – ella at farið nakrar túrar til skips við skipum, sum hava trupult at fáa manning.

- Men nei, tað ber heldur ikki til, tí kipanin leggur upp til, at tú í staðin skal ganga óvirkin hetta tíðarskeið og fáa minstaforvinning.

Kári P. Højgaad heitir tí á landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, um at fáa broytt tey krøv, sum er galdandi fyri tað, sum rópt verður fullriknar útróðrarbátar.

## Bólkur 5B

Løgtingsmaðurin vísir á, at í bólki 5B eru 652 loyvi útskrivað í fiskiárinum, sum nú rennur út.

- Landsstýrismaðurin hevur skotið upp at taka 5.000 dagar burtur úr bólki 5, og vit vita ikki, hvussu skipanin kemur at virka, og hvussu nógvar dagar eitt B-fiskiloyvi kann væntast at fáa, um tað skuldi hent, at uppskot landsstýrismansins verður samtykt óbroytt.

Kári sigur, at tað er trupult at fiska kring Føroyar, tí tað er streymhart og mangan buldrasligt veðurlag. Tí verða tað eisini altíð náttúrligar avmarkingar, serstakliga fyri smærru fiskiførini.

- Veruleikin er, at umleið 16 vikur um árið er streymurin rættiliga harður og avmarkar ella beinleiðis forðar línuveiði á innaru leiðunum. Harafturat kemur so avmarkingin í veðrinum, sum kann verða ymisk frá ári til ár.

Hann sigur, at teir fægstu, sum seta sítt álit á heimaútróður, hava seinnu árini fingið eina úrtøku, sum kann geva eina greiva tilveru, sum hann tekur til.

- Heldur er talan um blóð, sveitta og tár, sigur Kári P. Højgaard.

Hann vísir eisini á, at útróðrarbátarnir í bólki 4 eru uppaftur verri fyri í skipanini.

- Ein útróðrarbátur yvir 15 tons, sum ikki hevur "børsað" sær nakrar eykadagar, hevur neyvan meiri enn slakar 60 fiskidagar at ráða yvir. Tað sigur seg sjálvt, at hesin ongan møguleika hevur at dríva útróður sum heilársvinnu, sigur løgtingsmaður Sjálvsstýrisfloksins, Kári P. Højgaard.

*vilmund@sosialurin.fo*




# Náttúrumyndir í Focus

## Friggjadagin letur Kári Svensson upp stóra málningaframsýning í Gallarí Focus í Havn

**Randi Jacobsen**

Frá friggjadegnum til 26. august hevur listamálarin Kári Svensson framsýning í Gallarí Focus í Havn.

Framsýningina nevnir hann Eina ferð gjøgnum náttúruna, og á framsýningini hevur hann 18 málningar.

Fernisering verður fríggjadagin frá kl. 16 til 18.

Hetta er fimtur ferð, at Kári Svensson hevur framsýning í Gallarí Focus.

*randi@sosialurin.fo*